## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Stuðusskipanin við nýggjari tænastu

**»Stuðulsskipanin fyri Vaksin« er nú komin við einari nýggjari skipan, sum fyrstu ferð er roynd í Føroyum. Í Suðurstreymoy arbeiðir Starvsfólkið nú sum eitt toymi. Ætlanin er at fáa hesa toymisskipan at virka um alt landið**

**STUÐULSSKIPAN**
*Myndir:*
*Magnus Gunnarsson*

Uppgávan hjá »Stuðulstoyminum fyri Vaksin« er at veita persónligan stuðul til heimabúgvandi sálarsjúk í aldrinum 18-67 ár, sum øll hava tørv á stuðli í heiminum.

Stuðulsskipanin er nú komin við einari nýggjari skipan, sum fyrstu ferð er roynd í Føroyum. Í Suðurstreymoy arbeiðir Starvsfólkið nú sum eitt toymi.

Sum tað hevur verið higartil, hevur eitt starvsfólk verið til hvønn brúkara, men tað slóðbrótandi við nýggju skipanini er, at nú arbeiða starvsfólkini sum eitt toymi við tvørfakligari vitan.

Stuðulsskipanin fyri vaksin setir sum treyt, at starvsfólk ið skulu arbeiða í toyminum skulu




*Toymið í nýggju stuðulsskipanini, ið øll eru fakfólk, f.v.: Hildigunn Tausen, Róa Midjord, Elsa Klein Olsen, Jensia Brodersen og Heidi Tvørfoss. Myndin er tikin í Løkju kaféini í nýinnrættaðu hølunum á Argjum*



hava eina sosial- ella eina heilsufakliga útbúgving. Grundgevingin fyri hesum er tann, at tað fakliga støði í stuðulsarbeiðinum skal kunna avspeglast í stuðulsarbeiðinum og skal hetta koma brúkaranum til góðar. Hvørt stuðulsfólk hevur 6-7 brúkarar, sum tey hava tilknýti til.

Tann ymiska fakliga vitanin í toyminum ger, at tey fáa heildarmyndina við, tá tey skulu finna tørvin hjá tí einstaka brúkaranum.

Starvsfólkið í toyminum fær eisini stórt gagn av at arbeiða í toyminum, tá tann fakligi førleikin hjá hvørjum einkultum starvsfólki er so ymiskt samansettur.

Nýggja skipanin er gjørd eftir donskum leisti, men er lagað til føroysk viðurskifti. Stuðulsskipanin samstarvar eisini við fýra danskar kommunur við m.a. at starvsfólkini í stuðulstoyminum, samstarva við tilsvarandi stuðulstoym í Danmark.

Hetta verður gjørt við at stuðulstoymið hevur møguleika fyri at starvsfólk frá toyminum luttaka á fundum og skeiðum í Danmark. Endamálið við hesum er, at stuðulstoymið skal menna sín fakliga og persónliga førleika og fáa íblástur til stuðulsarbeiðið.

Tað var 1. januar 2003 at »Stuðulsskipanin fyri Vaksin« var yvirtikin av Heimarøktini og Serforsorgini. Stovnurin heldur til í Løkjutúni 1 á Argjum, og leiðari á stovninum er Regin Johansen, ið er útbúgvin sosialráðgevi við psykologiyvirbygningi.

*Regin Johansen, leiðari, saman við starvsfólkunum Heidi Tvørfoss (v.m.) og Hildigunn Tausen, sum júst nú hava verið og vitjað eitt stuðulstoym í Danmark*

# Praktikantar í Bowlinghøllini í Havn

**Hesar tvær seinastu vikurnar hevur 10. flokkur í Eysturskúlanum verið í starvsvenjing. Niclas Reginsson og Áki Vang valdu at fara í starvsvenjing í bowling høllina í Havn**

**PRAKTIKANTAR**
*Barbara Tausen*

Í viku 46 og 47 vóru Niclas Reginsson og Áki Vang í starvsvenjing í bowlinghøllini í Havn, Niclas hevði hoyrt frá einum vinmanni, at her var sera gott at vera, og valdi so at royna tað.

Teimum dámdu væl at vera har, og hildu at tað var sera áhugavert. Eisini siga teir, at teir ikki høvdu havt nakað ímóti at arbeitt í bowlinghøllini. Teir kundu velja at møta klokkan 11.00 og fáa frí klokkan 16.30, ella kundu teir møta klokkan 17.00 og fáa frí klokkan 22.00.

Tá teir vóru í Bowlinghøllini , stóðu teir við kassan, vaskaðu banarnir um morgunin, ordnaðu maskinurnar, um okkurt skuldi verið galið, og eisini onnur smáting. Hetta hava verið tvær sera góðar vikur siga teir við einum smíli.



*Áki Vang og Niclas Reginsson dámdu sera væl í Bowlinghøllini*

*Mynd: Barbara Tausen*

# Í starvsvenjing á Tjaldurs Apoteki

**Kristina Thomassen og Karla A. Vang ganga báðar í 10. flokki í Eysturskúlanum. Í tveimum teimum síðstu vikunum hava tær verið í starvsvenjing á Tjaldurs Apoteki**

**STARVSVENJING**
*Lena R. Guttesen*

Frá mánadegnum 14. nov. til fríggjadagin 25. nov. hava 10. flokkarnir í Eysturskúlanum verið í starvsvenjing. Tær báðar Kristina Thomassen og Karla A. Vang valdu báðar at royna Tjaldurs Apotek. Kristina hevði hoyrt frá einari vinkonu, ið hevði verið har áður, at hetta staði var sera áhugavert. Eisini vildi hon síggja hvussu tey arbeiddu har. Karla hevur harafturímóti áhuga fyri medisini, og hevur hugsað um at gerast sjúkrasystur.

Hon søkti fyrst inn á Landssjúkrahúsið, men av tí at aðrir praktikantar vóru har, valdi hon ístaðin Tjaldurs Apotek.

Eftir tveimum áhugaverdum og arbeiðssomum vikum, eru tær sera væl nøgdar. Tær fingu eitt fjølbroytt skema at ganga eftur, har tær m.a. hava lært at seta vørur upp á pláss, gera reseptir og pakkað ymisk medisin.

Vit spurdi tær so til seinast, um tær høvdu viljað havt hetta sum arbeiði. Har ivaðist Kristina eitt sindur og segði, at tað var sera áhugavert, men ikki júst tað rætta fyri hana. Karlu dámdi sera væl og hevur enn ætlanir um at gerast sjúkrasystur.



*Praktikantar á Tjaldurs Apoteki: Karla A. Vang og Kristina Thomassen*

*Mynd: Barbara Tausen*